# Dátuviðgerðaravtala

millum

| |
|---|
| |
| |
| |
| |
| |

hereftir ”dátuábyrgdarin”

og

**Pf. Formula**
V-tal 372765
Óðinshædd 2
100 Tórshavn
Føroyar
hereftir ”dátuviðgerin”,

*sum hvør sær eru ”partar” og saman eru ”partarnir”, hava avtalað fylgjandi standardásetingar fyri at fylgja reglunum í dátuverndarlógini. Avtalan er sbrt. § 43 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin).*

Dátuviðgerðaravtala
Versjón 1.1
21. mars 2024

## 1. Innleiðsla

1. Hendan avtalan avger rættindi og skyldur hjá dátuviðgeranum, tá ið dátuviðgerin viðger persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran. Avtalan er gjørd, soleiðis at partarnir samstundis lúka treytirnar í § 41, stk. 2 í dátuverndarlógini.

2. Í sambandi við, at Pf. Formula er dátuviðgeri hjá einum dátuábyrgdara, viðger Pf. Formula persónupplýsingar vegna dátuábyrgdaran í samsvari við hesa avtalu.

3. Ásetingarnar í hesi avtalu ganga framum møguligar aðrar avtalur millum partarnar, sum hava líknandi ásetingar. Hendan avtala gongur ikki framum skyldur, sum dátuviðgerin hevur ella er álagdur eftir dátuverndarlógini ella aðrari lóggávu. Ásetingar í avtaluni skulu tulkast til fyrimunar fyri vernd av rættindum hjá tí einstaka. Henda avtala viðger bert viðurskifti í samband við dátuverndarlógina; øll onnur viðurskifti, so sum fíggjarlig, møguligir garantiir o.l. verða viðgjørd í øðrum viðkomandi skjølum.

4. Avtalan skal vera til taks skrivliga, undir hesum elektroniskt, hjá báðum pørtum. Avtalan liggur alment á heimasíðuni hjá dátuviðgeranum.

## 2. Dátuviðgerin ger eftir boðum

1. Dátuviðgerin kann einans viðgera persónupplýsingar eftir skjalfestum boðum frá dátuábyrgdaranum.

2. Dátuviðgerin viðger persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran á henda hátt:

   Tær viðgerðir dátuviðgerin fremur dátuábyrgdarans vegna, eru lýstar í veitingaravtalu millum partarnar. Dátuviðgerin tryggjar at viðgerðin av persónupplýsingum, sum avtalan fevnir um, fer fram í einum tryggum umhvørvi.

   Dátuviðgerin brúkar í ávísum føri, sum part av tænastuveitingini, undirdátuviðgerar uttanfyri Føroyar, og eru teir allir staðsettir í góðkendum 3. landi, ES ella EBS. Dátuviðgerin dagførir yvirlit yvir neyðugar undirdátuviðgerar, sjá yvirlitið her: https://www.formula.fo/undirdatuvidgerar/

   Í flestu førum hevur undirdátuviðgerin almennan dátuverndarpolitik, ið er tøkur umvegis heimasíðuna hjá undirdátuviðgeranum. Í tann mun tað er gjørligt, er leinkjan at finna í yvirlitinum yvir undirdátuviðgeran. Í teimum føri, har serlig avtala er gjørd millum dátuviðgera og undirdátuviðgera, kann avtalan eftir áheitan verða latin dátuábyrgdaranum. Dátuábyrgdarin kann til eina og hvørja tíð uppsiga samstarvið við dátuviðgeran, um ein ella fleiri av undirdátuviðgerunum ikki kunnu góðtakast.

3. Dátuviðgerin boðar alt fyri eitt dátuábyrgdaranum frá, um dátuviðgerin metir, at eini boð frá dátuábyrgdaranum eru í ósamsvari við galdandi lóggávu.

   Um dátuábyrgdarin gevur dátuviðgeranum eini boð og hesi eftirfylgjandi vísa seg at vera ólóglig, kann dátuviðgerin ikki ábyrgdast fyri nøkrum krøvum í hesum sambandi, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis, millum annað frá myndugleika, teim skrásettu, ella 3. parti.

4. Dátuábyrgdarin kann til eina og hvørja tíð geva dátuviðgera boð um fyribils at steðga viðgerð, um dátuábyrgdarin metir, at dátuviðgeri ella undirdátuviðgeri ikki viðger dátur í samsvari við dátuverndarlógina ella ásetingarnar í hesa avtalu.

**3. Undirdátuviðger**

1. Tá ið dátuviðgerin nýtir undirdátuviðgera, skal dátuviðgerin í bindandi avtalu áleggja undirdátuviðgera at halda somu skyldur, sum eru álagdar dátuviðgeranum í hesi avtalu.

2. Avrit av viðkomandi ásetingum í avtalu við undirdátuviðgera og broytingar í hesum avtalum skulu eftir umbøn sendast dátuábyrgdaranum.

3. Í avtaluni við undirdátuviðgera skulu eisini vera ásetingar um at tryggja rættindi hjá dátuábyrgdaranum og skrásetta, í fall dátuviðgerin ella onnur millumlið fara á húsagang.

4. Dátuviðgerin hevur fulla ábyrgd mótvegis dátuábyrgdaranum av, at skyldurnar í hesi avtalu verða hildnar, sjálvt um tað er undirdátuviðgeri, sum ikki heldur sínar skyldur. Ábyrgdarbýti ávirkar ikki rættindini hjá teimum skrásettu sambært dátuverndarlógini, undir hesum t.d. § 77 um endurgjald.

5. Undirdátuviðgerar, sum viðgera persónupplýsingar vegna dátuviðgeran í sambandi við fremjan av tænastuveitingaravtaluni millum partarnar, eru skjalfestir í yvirlitið, sjá pkt. 2.2.

**4. Trygd og trúnaður**

1. Dátuviðgerin skal – óheft av dátuábyrgdaranum – meta um váðarnar við viðgerðini fyri tann skrásetta og seta í verk hóskandi tiltøk. Dátuábyrgdarin skal í tí sambandi veita dátuviðgeranum allar viðkomandi upplýsingar, so at dátuviðgerin er førur fyri at eyðmerkja og meta um váðan.

2. Dátuviðgerin hevur ein yvirskipaðan Kunningartrygdarpolitikk, ið er grundaður á ISO/EIC 27001, umframt hóskandi tøknilig og bygnaðarlig krøv. Trygdartiltøk fyri tænastuveitingina eru nærri lýst og avtalað í serskildari veitingaravtalu millum partarnar.

3. Dátuviðgerin skal viðgera allar persónupplýsingarnar frá dátuábyrgdaranum í trúnaði. Dátuviðgerin skal syrgja fyri, at starvsfólk hjá dátuviðgeranum, undirdátuviðgera og onnur hava bundið seg til trúnað ella eru bundin av hóskandi lógarásetingum um trúnað. Hesir persónar fáa bert atgongd til persónupplýsingarnar, um tað er neyðugt.

4. Listi yvir persónar, sum hava atgongd til persónupplýsingarnar, skal vera atkomuligur hjá dátuábyrgdara og gjøgnumgangast við jøvnum millumbili.

**5. At hjálpa og stuðla dátuábyrgdaranum**

1. Dátuviðgerin skal hjálpa dátuábyrgdaranum m.a. við at veita dátuábyrgdaranum upplýsingar um tøknilig og bygnaðarlig tiltøk, sum eru sett í verk, og aðrar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at dátuábyrgdarin er førur fyri at halda sínar skyldur sbrt. §§ 46-52 í dátuverndarlógini og svara umbønum, sum skrásett seta fram sbrt. kapittul 4 í lógini.

2. Dátuviðgerin skal geva dátuábyrgdaranum allar upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at vísa á, at §§ 41 og 42 í dátuverndarlógini og henda avtala verða hildnar, og skal fáa í lag og hjálpa til við skoðan, undir hesum kanningum, sum dátuábyrgdarin sjálvur ella triðipartur, sum er heimilaður av dátuábyrgdaranum, fremur. Møguligur kostnaður av hesum er fyri dátuábyrgdarans rokning og skal avtalast millum partarnar.

3. Dátuviðgerin skal uttan óneyðugt drál og skjótast gjørligt boða dátuábyrgdaranum frá eftir at vera vorðin kunnugur við, at viðgerð ikki er í samsvari við dátuverndarlógina ella avtaluna.

**6. At lata aftur og strika upplýsingar**

1. Tá ið viðgerðin hjá dátuviðgeranum er endað, hevur dátuviðgerin og undirdátuviðgeri skyldu at lata persónupplýsingarnar aftur og strika øll avrit, um tað ikki er álagt í lóggávu at goyma persónupplýsingarnar. Váttan um hetta skal latast dátuábyrgdara.

**7 Broytingar í dátuviðgerðaravtaluni**

1. Sum liður í at dátuverndarlógin ella dátuverndarsiðvenja kann verða fyri broytingum, tilskilar dátuviðgerin sær rættindi til, at dátuviðgerðaravtalan verður dagførd samsvarandi nýggjum krøvum. Dátuviðgerðaravtalan er til eina og hvørja tíð tøk á heimasíðuni hjá Formula.

2. Dátuviðgerin hevur rætt til at gera broytingar í vavi og nýtslu av undirdátuviðgerum. Dagført yvirlit yvir allar undirdátuviðgerar er til eina og hvørja tíð at finna á heimasíðuni hjá Formula, sjá leinkju í pkt. 2.2.

3. Fyri at virða rættin hjá dátuábyrgdaranum at mótmæla broytingum, bæði viðvíkjandi dátuviðgerðaravtaluni og nýtsluni av undirdátuviðgerðum, verða allar møguligar broytingar

kunnaðar áðrenn tær fáa virkna. Freistin hjá dátuábyrgdaranum til at mótmæla er 10 yrkadagar eftir at kunningin er farin út; eftir hetta koma møguligar broytingar í gildi.

Um dátuábyrgdarin ikki kann góðtaka ein ella fleiri undirdátuviðgerar hevur hann rætt til at uppsiga galdandi veitingaravtalu.

**8. Gildiskoma og gildisslit**

1. Avtalan kemur í gildi tann dagin dátuábyrgdarin hevur veitingaravtalu.

2. Báðir partar kunnu hvør sær krevja nýggjar samráðingar um ásetingarnar, um lógarbroytingar ella óskynsemi í avtaluni ger seg galdandi.

3. Avtalan er galdandi so leingi dátuviðgerin skal viðgera persónupplýsingar fyri dátuábyrgdaran. Í hesum tíðarskeiði kann henda avtalan ikki sigast upp, uttan so at aðrar ásetingar, sum snúgva seg um viðgerðina av persónupplýsingum, verða avtalaðar millum partarnar.

4. Er viðgerin av persónupplýsingum endað, og upplýsingar eru latnar aftur ella strikaðar sbrt. pkt. 6, kann avtalan sigast upp av báðum pørtum hvør sær við skrivligum varningi á 12 vikur.

**9. Undirskriftir**

| | | |
|---|---|---|
| Dátuábyrgdarans vegna | ______________________ | ______________________<br>dagfesting |

Henda avtala er at meta sum bindandi fyri dátuábyrgdaran, tá heimilaður persónur frá dátuábyrgdaranum hevur undirskrivað veitingaravtalu við dátuviðgeran, treytað av at dátuviðgerin løgfrøðiliga er at meta sum dátuviðgeri í hesum sambandi.

| | | |
|---|---|---|
| Dátuviðgerans vegna | Annfinn Thomsen<br>Trygdarleiðari | 21/5-2024<br>dagfesting |

Henda avtala er at meta sum bindandi fyri dátuviðgeran, tá heimilaður persónur frá dátuviðgeranum hevur undirskrivað veitingaravtalu við dátuábyrgdaran, treytað av at dátuviðgerin løgfrøðiliga er at meta sum dátuviðgeri.